KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 08.10.2015 kl. 17:30
**Málnr.:** 13/00245 Gerðabók

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Eyðstein Ó. Poulsen, Atli S. Justinussen, Herfrí J. Sørensen og Erling Petersen.

Varalimir: Karl Marius Poulsen fyri Óluvu Klettskarð.

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokolførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 101/15 | 15/00935-2 | Býráðslimur burturstaddur - Óluva Klettskarð |
| 102/15 | 15/00904-1 | Tónlistaskúlin partur av skúlabygginginі |
| 103/15 | 11/00134-35 | Góðkenning av broyttum viðtøkum fyri Mentanarhúsið í Klaksvík |
| 104/15 | 12/00793-79 | Serstøk byggisamtykt fyri miðbýarøkið - Sniðhondbók |
| 105/15 | 15/00539-6 | Raðfestingar í 2016 - staðbundnu nevndirnar |
| 106/15 | 15/00213-15 | Eykajáttan til Norðoyrarnevndina í 2015 - *fyrra viðgerð* |
| 107/15 | 15/00801-2 | Keyp av teldum, 9. flokkar, á Skúlatrøð – *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 108/15 | 15/00723-3 | Umsókn um marknaumskipan |

# 101/15
# 15/00935 Býráðslimur burturstaddur - Óluva Klettskarð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 08.10.2015 | 101/15 |

**Frágreiðing um málið:**
Óluva Klettskarð, býráðslimur, hevur umvegis teldupost boðað borgarstjóranum frá, at hon verður burturstødd í meira enn samfullar 14 dagar og tí ikki fær møtt á býráðsfundinum hóskvøldið 8. okt. Hon biður samstundis um, at næstvaldi á listanum fær fundarboð til hendan býráðsfundin.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, §18:
*Stk. 2 Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
*Stk. 3 Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at Karl Marius Poulsen, ið er næstvaldi á valevnislistanum, tekur sæti í býráðnum á fundinum 8. okt. 2015 fyri Óluvu Klettskarð.

**Býráðsins samtykt 08-10-2015**
Tilmælið einmælt samtykt, og Karl Marius Poulsen tók sæti fyri Óluvu Klettskarð.

# 102/15
# 15/00904 Tónlistaskúlin partur av skúlabygginginí

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 29.09.2015 | 38/15 |
| 2 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 29.09.2015 | 36/15 |
| 3 Fíggjarnevndin | 06.10.2015 | 83/15 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 08.10.2015 | 102/15 |

**Frágreiðing um málið:**
Nevndin fyri Tónlistaskúlan hevur verið á fundi við borgarstjóran og sett fram ynski um, at Tónlistaskúlin í framtíðini verður partur av á Skúlatrøð heldur enn av Mentanarhúsinum í miðbýnum.

Ført varð fram, at eitt samanspæl millum fólkaskúla og tónlistaskúla hevur nógvar fyrimunir og kann stimbra undir menningina av børnunum.

Upprunaliga var Tónlistaskúlin ikki partur av Sjálvsognarstovninum Mentanarhúsið í Klaksvík, men eftir ynski frá stýrislimi varð hann tikin við. Helga Gerðalíð hevur umboðað Tónlistaskúlan í sjálvsognarstovninum fram til nú, men verður loysnin tann, at Tónlistaskúlin ikki skal vera partur av Sjálvsognarstovninum Mentanarhúsið í Klaksvík, er rættast at umskipa nevndina, soleiðis at tónlistaskúlin fer úr hesari nevndini.

Í staðin verður neyðugt, at Tónlistaskúlin verður partur av arbeiðinum at tryggja karmarnar til sítt virksemi á Skúlatrøð í samráð við leiðslu skúlans, og at Tónlistaskúlin verður umboðaður í tí arbeiðnum. Hetta kann eitt nú gerast í samband við komandi byggistig.

**Lógargrundarlag:**
Sambært § 3 í løgtingslóg um stuðul til musikkskúlar, sum broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 20. mai 1996, skal ein musikkskúli "*vera knýttur at eini kommunu ella einum kommunalum felagsskapi*" og "*vera góðkendur av Landsstýrismanninum*", tvs. tað er ein kommunal uppgáva at útvega hølisumstøður til musikkskúlan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fíggjarligu avleiðingarnar av hesum eru ikki lýstar enn, men endamálið við hesari samskipan av fólkaskúla og tónlistaskúla er ein felags og harvið eisini betur gagnnýtsla av undirvísingarhølum skúlanna.

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið lagt fyri nevnd og býráð við tilmæli um:
- at heimild verður givin til at arbeiða víðari við at umskipa Tónlistaskúlin til at verða partur av skúlabyggingini
- at umboðið fyri tónlistaskúlan fer úr nevndini fyri Sjálvsognarstovnin Mentanarhúsið í Klaksvík

**MeN 29-09-2015:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og vinnu- og mentanarstjóranum

**TrN B&U 20-09-2015:** Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 25.09.15.

**FíN 06-10-2015:** Nevndin tekur undir við MeN og TrN B&U 29-09-2015

**Býráðsins samtykt 08-10-2015**
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 06-10-2015.

# 103/15
# 11/00134 Góðkenning av broyttum viðtøkum fyri Mentanarhúsið í Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 08.10.2015 | 103/15 |

**Frágreiðing um málið:**
Á stýrisfundi í grunninum Mentanarhúsið í Klaksvík 29. sept. 2015 boðaði Klaksvíkar Tónlistaskúli frá, at tey taka seg úr stýrinum. Stýrið tók hesa fráboðan til eftirtektar.
Stýrið samtykti eftirfylgjandi at heita á borgarstjóra Klaksvíkar kommunu um at taka sæti í stýrinum umboðandi býráðsumsitingina, so leingi ætlan er um at hava býráðssal í bygninginum hjá Mentanarhúsinum.

Hesar avgerðir viðføra eina broyting í viðtøkum grunsins, og skulu viðtøkubroytingar góðkennast av Klaksvíkar Býráð.

Broyting í §3, Leiðsla - frá:

Grunnurin verður umsitin av einum stýri við 6 limum, sum verða valdir soleiðis:
- Klaksvíkar Sjónleikarafelag velur ein lim,
- Norðoya Listafelag velur ein lim,
- *Nevndin fyri Klaksvíkar Tónlistaskúla velur ein lim,*
- Norðurlandahúsið í Føroyum velur ein lim, og
- Klaksvíkar Býráð velur tveir limir.

Limirnir verða valdir fyri 4 ár í senn aftaná eitt býráðsval.

Broyting í §3, Leiðsla - til:

Grunnurin verður umsitin av einum stýri við 6 limum, sum verða valdir soleiðis:
- Klaksvíkar Sjónleikarafelag velur ein lim,
- Norðoya Listafelag velur ein lim,
- Norðurlandahúsið í Føroyum velur ein lim,
- Klaksvíkar Býráð velur tveir limir, *og*
- *borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu.*

Limirnir verða valdir fyri 4 ár í senn aftaná eitt býráðsval.

**Lógargrundarlag:**
Grein 12 í viðtøkum grunsins (sí undirskjal)

**Tilmæli:**
Mælt veður til at góðkenna broyttu samtyktir grunsins.

**Býráðsins samtykt 08-10-2015**
Einmælt samtykt at góðkenna broyttu viðtøkurnar fyri grunnin Mentanarhúsið í Klaksvík.

# 104/15
# 12/00793 Serstøk byggisamtykt fyri miðbýarøkið - Sniðhondbók

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 28.09.2015 | 93/15 |
| 2 Mentanarnevndin | 29.09.2015 | K-16/15 |
| 3 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 29.09.2015 | K-16/15 |
| 4 Tekniska Nevnd | 30.09.2015 | 34/15 |
| 5 Havna- og Vinnunevndin | 01.10.2015 | 34/15 |
| 6 Fíggjarnevndin | 06.10.2015 | 81/15 |
| 7 Klaksvíkar Býráð | 08.10.2015 | 104/15 |

**Frágreiðing um málið:**
Fyrsti partur av "nýggju miðbýarætlanini" fevndi um eina serstaka byggisamtykt fyri økið, og sum framhald av hesum hevur Býráðið samtykt eitt skipanaruppskot í juni 2015. Samstundis hevur verið arbeitt við einari "designmanual" ella sniðhondbók, sum skal nýtast í samskiftinum við tey, sum byggja skulu í miðbýarøkinum. Tekniska Umsiting metir, at serstaka byggisamtyktin saman við sniðhondbókini gevur møguleikar fyri fjølbroyttari bygging, og at talan er um góð arbeiðsamboð, sum nýtast kunnu til byggimálsviðgerð og til víðari skipan av byggibúningararbeiðinum o.ø.

Nú er sniðhondbókin klár, og verður hendan tí send nevndum og býráði til viðgerðar og kunningar. Upplýst verður í hesum sambandi, at vinnandi arkitekturin hevur tikið sær av arbeiðinum at gera sniðhandbókina, og er hetta gjørt í samstarvi við kommununa. Upplýst verður eisini, sniðhondbókin er fult í tráð við samtykta vinnara- og skipanaruppskotið.

**Lógargrundarlag:**
Ongin viðmerking

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Málið hevur ongar nýggjar avleiðingar fyri fíggjarætlan kommununnar komandi árini, tí skipanarupp-skotið, sum Býráðið samtykti í juni 2015, tekur atlit til sniðhondbókina.
*Upplýst er áður, at trupult er at gera neyva meting av samlaðum kostnaði fyri byggibúning í miðbýnum, tí ein neyvari lýsing má gerast í samráð við ráðgevararnar, og eftir hetta verður kostnaðurin settur upp. Fyribils er samlaður byggibúningarkostnaður í miðbýnum mettur til 57,6 mió. kr. Fyrsta byggistig er mett til 23,3 mió. kr. Við hesum er byggibúningararbeiðið kring bygginina hjá Bústaðir liðugt, tilkoyringarvegurin millum Betesda og Føroya Tele er gjørdur, og hylurin ella kanalin upp at torginum, har BankNordik skal byggja, er eisini við. Í samband við leiðingsarbeiði eru brúgvar yvir Vágsánna og Ósánna eisini tiknar við.*

**Tilmæli:**
Við hesum verður mælt nevndum og býráði til at samtykkja sniðhondbókina.

**UBN 28-09-2015:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 22. sept. 2015.

**MeN 29-09-2015:** Nevndin tekur undir við UBN 28-09-2015.

**TrN B&U 29-09-2015:** Málið til kunning.

**TN 30-09-2015:** Nevndin tekur undir við UBN 28-09-2015 og MeN 29-09-2015.

**HaVN 01-10-2015:** Nevndin tekur undir við UBN 28-09-2015, MeN 29-09-2015 og TN 30-09-2015.

**FíN 06-10-2015:** Nevndin tekur undir við UBN 28-09-2015, MeN 29-09-2015, TN 30-09-2015 og HaVN 01-10-2015.

**Býráðsins samtykt 08-10-2015**
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 06-10-2015.

## 105/15
## 15/00539 Raðfestingar í 2016 - staðbundnu nevndirnar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 28.09.2015 | 95/15 |
| 2 Mentanarnevndin | 29.09.2015 | 35/15 |
| 3 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 29.09.2015 | K-17/15 |
| 4 Tekniska Nevnd | 30.09.2015 | 35/15 |
| 5 Havna- og Vinnunevndin | 01.10.2015 | 35/15 |
| 6 Fíggjarnevndin | 06.10.2015 | 79/15 |
| 7 Klaksvíkar Býráð | 08.10.2015 | 105/15 |

**Frágreiðing um málið:**
Við hesum verður málið um samtyktar raðfestingar í 2016 - hjá staðbundnu nevndunum - lagt fyri viðkomandi nevndir og Býráð.

Raðfesting hjá staðbundnu nevndunum í 2016, við vegleiðandi kostnaði, eru hesar:

Mikladalsnevndin:
1. Asfaltering rundan um vøllin og frá Seyðgrøvini til Sparkivøllin og víðari oman til bygdina. Kr. 500.000,-
2. Liðugtgerð av Kappanum. Kr. 200.000,-
3. Liðugtgerð av viðarlundini og tjørnini. Kr. 200.000,-
4. Vegurin undir Kambi.
5. Garður norðanfyri kirkjuna. Kr. 30.000,-
6. Ábøtir á Stóraneyst. Kr. 30.000,-

Árnafjarðarnevndin:
1. Liðugtgerð av útstykking/vegum uppi á Lánni og í Gerðunum. Kr. 3.000.000,-

2. Parkeringspláss til neystini. Kr. 400.000,-
3. Liðugtgerð av asfaltering í bygdini. Kr. 350.000,-
4. Atkomugøta millum matr. nr. 40a og 77. kr. 40.000,-

Norðoyrarnevndin:
1. Liðugtgerð av Flatnavegi. Kr. 3.000.000,-
2. Nýtt spælipláss á Norðoyri. Kr. 250.000,-
3. Alment vesi (gróthúsið hjá JZH). Kr. 200.000,-
4. Ábøtir á sparkivøllin. Kr. 200.000,-

Svínoyarnevndin:
1. Gamligarður liðugtgerð. Kr. 2.000.000,-
2. Asfaltering í bygdini. Kr. 500.000,-
3. Rampin á Eiðinum (søkja um stuðul)
4. Vesið á Eiðinum. Kr. 200.000,-
5. Kloakkirnar (hava játtan)
6. Vetrarfriðing. Kr. 700.000,-
7. LED-ljós - liðugtgerð í bygdini íroknað vegin til J. Eliasen. Kr. 300.000,-
8. Uppdyrkingarvegir (søkja um stuðul)
9. Svimjuhylurin (søkja um stuðul)
10. Breiðkan av vegnum um Eiðið (Landsverk)

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrisskipanin fyri Klaksvíkar kommunu frá 22. november 2013 ásetir, at staðbundnar nevndir
taka sær av áhugamálum, sum býráðið metir at hava serligan áhuga fyri Árnafjørð, Mikladal, Trøllanes,
Svínoy og Norðoyri, og verða slík mál send nevndunum til ummælis, sum innan ein mánað, vegleiðir,
umrøður og ger tilmæli.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongin viðmerking.

**Tilmæli:**
Vísandi til fíggjarætlanina fyri 2016, verður málið við hesum lagt fyri viðkomandi nevndir og Býráð.

**UBN 28-09-2015:** Málið verður tikið upp í samband við Temadagarnar 2015.

**MeN 29-09-2015:** Nevndin tekur undir við UBN 28-09-15

**TrN B&U 29-09-2015:** Málið til kunning

**TN 30-09-2015:** Nevndin tekur undir við UBN 28-09-2015 og MeN 29-09-2015

**HaVN 01-10-2015:** Nevndin tekur undir við UBN 28-09-2015, MeN 29-09-2015 og TN 30-09-2015.

**FíN 06-10-2015:** Nevndin tekur undir við UBN 28-09-2015, MeN 29-09-2015, TN 30-09-2015 og HaVN 01-10-2015.

**Býráðsins samtykt 08-10-2015**
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 06-10-2015.

## 106/15
## 15/00213 Eykajáttan til Norðoyrarnevndina í 2015 - *fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 30.09.2015 | 37/15 |
| 2 Fíggjarnevndin | 06.10.2015 | 80/15 |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 08.10.2015 | 106/15 |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 12.11.2015 | |

**Frágreiðing um málið:**
Borgarstjórin hevur heitt á umsitingina um at leggja eitt uppskot um eykajáttan fyri viðkomandi nevndir og býráð í september 2015. Talan er um part av einum íløguarbeiði á Norðoyri, og umfatar arbeiðið at leggja asfalteringsundirlag á Flatnavegin fyri ein kostnað á 300 tkr. Arbeiðið viðførir, at ferðsluviðurskiftini eftir Flatnavegnum batna munandi.

**Lógargrundarlag:**
Ongin viðmerking

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Talan er um eina eykajáttan til *Vegir Íløga* á 300 tkr., sum ætlast fíggjað av *tøkum peningi*. Hetta merkir, at íløgusíðan á Fíggjarætlanini fyri 2015 hækkar við 300 tkr. Málið skal samtykkjast av býráðnum tvær ferðir, og Fíggjarmálaráðið skal kunnast.

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð til viðgerðar/støðutakan.

**TN 30-09-2015:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU 25-09-2015.

**FíN 06-10-2015:** Nevndin tekur undir við TN 30-09-2015.

**Býráðsins samtykt 08-10-2015**
Einmælt samtykt við fyrru viðgerð at taka undir við TN 30-09-2015 og FíN 06-10-2015.

## 107/15
## 15/00801 Keyp av teldum, 9. flokkar, á Skúlatrøð – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 14.09.2015 | 34/15 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.09.2015 | 75/15 |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 17.09.2015 | 88/15 |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 08.10.2015 | 107/15 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð viðgjørt og einmælt samtykt fyrru ferð av býráðnum 17. sept. 2015.

**TrN B&U 14-09-2015:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum dagfest 01.09.15.

**FíN 15-09-2015:** Nevndin tekur undir við TrN B&U 14-09-2015.

**Býráðsins samtykt 17-09-2015:** Einmælt samtykt við fyrru viðgerð at taka undir við TrN B&U 14-09-2015 og FíN 15-09-2015.

**Býráðsins samtykt 08-10-2015**
Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# 108/15
# 15/00723 Umsókn um marknaumskipan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 07.09.2015 | 83/15 |
| 2 Mikladalsnevndin | 21.09.2015 | 10/15 |
| 3 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 28.09.2015 | 96/15 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 08.10.2015 | 108/15 |

**Frágreiðing um málið:**




Umhvørvisstovan hevur sent kommununi umsókn um marknaumskipan dagf. 15. juli 2015 til ummælis.

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Mælt verður til at senda Umhvørvsstovuni málið við tilmæli um góðkenning, og at Mikladalsnevndin verður kunnað.

**UBN 07-09-2015:** Nevndin beinir málið til staðbundnu nevndina.

**MiklaN 21-09-2015:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU 21-08-2015.

**UBN 28-09-2015:** Nevndin tekur undir við Mikladalsnevndini 21-09-2015.

**Býráðsins samtykt 08-10-2015**
Einmælt samtykt at taka undir við UBN 28-09-2015.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**